tíðindablaðið
**sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Vælkomin til ein breiðan dialog

***Oddagrein***

Í gjár kom grønlendski fiskimálaráðharrin á vitjan í Føroyum. Hetta er upphiting til samráðingar um komandi fiskivinnusamvinnu millum londini. Grønlendski fiskimálaráðharrin skal vera hjartaliga vælkomin til Føroya. Væl vitandi, at nettupp Grønland og Føroyar eiga atgongd til nakrar av heimsins ríkastu fiskigrunnum og samtíðis eru so bundin at júst fiskivinnuni, er greitt, at báðar brøðratjóðirnar hava nógv at tosa um. Ein dialogur millum bæði londini átti at verið ein sjálvfylgja, men ikki bara tá tað snýr seg um fisk. Eisini tá tað snýr seg um onnur vinnuøki eiga vit at skifta orð hvør við annan. Og her hugsa vit m.a. um ta stóru avbjóðing, sum er báðum londunum fyri í løtuni, nevniliga komandi oljuleiting. Og her hevur spurningurin um eitt reint umhvørvi ómetaliga stóran týdning.

TAÐ er ikki so langt síðani, at Jonathan Motzfeldt undir eini vitjan í Føroyum legði alstóran dent á samvinnuna millum bæði londini og í hesum sambandi eisini fór út um vanliga samvinnuøkið, fiskivinnuna - til nettup komandi oljuútviklingin. Hann metti tað náttúrligt og rætt, at vit læra av hvørjum øðrum og fylgja útviklinginum hjá hvørjum øðrum, nú báðar tjóðir standa á einum týðandi vegamóti. Tað skal vera vón okkara, at tá grønlendski fiskimálaráðharrin fer heimaftur til Grønlands at tosa um komandi samvinnu á fiskivinnuøkinum eisini letur sínar starvsfelagar í landsstýrinum vita, at Føroyar og Grønland eiga at víðka um verandi samvinnuna og dialogin til eisini at fevna um tær stóru avbjóðingar, sum liggja í eini komandi oljuleiting. Sum smátjóðir við egnari mentan og har reint umhvørvi er ein fortreyt fyri framhaldandi menning, er rætt at minna á hetta við einum mennandi dialogi.

VIT eiga eisini at síggja Norðuratlantshavið sum eitt øki, ið vit allir, tvs. grønlendingar, føroyingar, íslendingar og lutvíst eisini norðmenn og kanadiarar eiga at kenna eina felags ábyrgd fyri, tað veri seg við atliti til at troyta livandi tilfeingið skilabest, at verja umhvørvið og at troyta nýggjar vinnumøguleikar. Vit eiga í hesum sambandi eisini at hava eina felags støðu til ta dálking, sum kemur frá ídnaðarlondunum og sum kann vera við til at undirgrava okkara egna tilverugrundarlag. Tí eigur dialogurin eftir okkara meting í sambandi við slíka vitjan eisini at nema við onnur fyri okkum lívstýðandi øki. Vit hava áður á hesum stað nevnt týdningin á samstarvið við íbúgvararnar í øllum tí arktiska økinum. Her hugsa vit um inuittar í Alaska, Kanada, Grønlandi og Buslandi. Hesi hava so avgjørt brúk fyri dialogi við umheimin, og her kunnu m.a. Føroyar verða eitt portur til umheimin. Liggjandi miðskeiðis millum stóra Europa og arktisku økini kunnu vit vera ein katalysor ella brúgvabyggjari, har trupulleikar og álvarsmál hjá inuittum fyri norðan verða kanalyseraðir víðari. Hetta er ein stór men eisini spennandi uppgáva, har nettup vit føroyingar við okkara kontaktum til Europa kunnu vera við til at loysa upp fyri tí, sum fer fram fyri norðan men sum so eisini hevur samband við okkara egna umhvørvi. Við at vísa áhuga fyri eitt nú grannum okkara fyri norðan seta vit eisini hol á mál, sum hava tilknýti til okkum sjálvi.

***Sosialurin***

Viðmerking:

# Fjølmiðlarnir og ítrótturin hava brúk fyri hvørjum øðrum!

*Og fjølmiðlarnir hava rós uppiborna fyri teirra viðgerð av føroysku hondbóltskappingini*

Hondbóltsgallaveitslan var eitt flott punktum eftir enn ein hendingarríkan hondbóltsvetur. Sjálvur havi eg enn eina ferð havt møguleikan fyri at verið við í fremstu rekkju, og tað fegnist eg um. Men á gallaveitsluni var eg óheppin í mínum orðavali, tá eg nevndi sambandið millum ítrótt og fjølmiðlar og eg skilji tað væl, um fjølmiðlafólk blivu eitt sindur firtin. Tað vil eg fegin gera gott aftur her og nú.

Tað er eyðsæð, at hondbóltsfeløgini skapa hondbóltsumhvørvi, sum eisini pressan kann vera ein partur av, men tað er sjálvsagt líka eyðsæð, at fjølmiðlarnir hava eina avgerandi ávirkan á, hvussu sjónligur hondbólturin er.

Og tað er ein sannroynd, at hevur hondbólturin ment seg hesi seinastu árini, so hevur viðgerðin av serliga 1.deildardystum (eisini hjá kvinnum) í bløðum og útvarpi sanniliga eisini ment seg nógv. Og tað er lítið at ivast í, at hesin áhugin hjá fjølmiðlunum er sera týdningarmikil fyri hondbóltin — ikki bara tí at tað økir um áhugan hjá spælarum og áskoðarum, men eisini tí at tað gevur feløgunum betri inntøkumøguleikar hjá sponsorum.

Nevndi ikki sjónvarpið. Sjónvarpið hevur aftur í vetur víst steypafinalurnar beinleiðis — tað er sera góð reklama. Men sigast má, at enn liggja nógvir møguleikar ótroyttir, tá tað kemur til samarbeiði við hendan fjølmiðilin. Tað hevur í hvussu so er stóran áhuga hjá hondbóltinum at fáa eitt betri skipað samband við sjónvarpið.

Tann fjórða fjølmiðilin — internetið — hava hondbóltsfeløgini og HSF ikki enn tikið rættiliga til sín, men tað er onki at bíða við, tí her liggja stórir møguleikar fyri eini enn betri koordinatión millum allar fjølmiðlarnar og hondbóltin.

Skal enda við at konstatera, at tá ið tað kemur til at viðgera tær yngru deildirnar í fjølmiðlunum er tað bara so, at feløgini sjálvi mugu gera vart við seg — senda bíløt og nøvn inn — biða eitt blaðfólk koma at hyggja o.s.fr.- afturfyri kunnu tey verða viss í at fáa blaðrúmd ella nøkur orð í ítróttartíðindunum.

Summa summarum : Víst hevur hondbólturin brúk fyri fjølmiðlunum og víst hava fjølmiðlarnir rós uppiborna fyri teirra viðgerð av føroysku hondbóltskappingini

**Við ítróttarkvøðu**
**Kári M. Mortensen**

# Brekini kunnu bøtast við nýggjari heimastýrislóg

**Til allar viðhaldsmenn og -kvinnur av fullveldinum.**

Tveir óvitar spyrja tann 6. apríl á heimasíðuni hjá fullveldinum »hvat skullu vit við damark?« Tað er júst spurningurin.

Vit hava nú verið saman við Danmark uppá gott og ónt í nógv hundrað ár, og eins og í einum hjúnaskapi eru bæði góðar og ringar tíðir. Tit eru nú í gongd við at sundurlesa hetta hjúnaskapið, sum í mótsetning til eitt vanligt hjúnalag, aldrin kann setast á stovn aftur. Tit binda okkara børn til at føla seg fremmand í einum landi, har ið foreldur teirra, og eisini Høgni Hoydal, hava fingið sína útbúgving á sama fóti sum danskarar og við somu møguleikum til undirvísingarstuðul sum teir.

Tit taka okkara sjálvsagda rætt at fáa viðgerð á donskum sjúkrahúsum. Tit taka okkara rætt at sigla sum skiparar við donskum skipum, tí til hetta krevst danskur statsborgararættur. Gamaní, siga tit, vit koma inn í norðurlendskt samarbeiði á hesum økjum, men tað er sanniliga ikki heilt uttan kostnaða.

Meðan vit tosa um statsborgararætt, so havi eg skilt tað soleiðis, at føroyingar, sum hava búð niðri í mong ár, skulu velja millum føroyskan ella danskan statsborgararætt, ikki bæði. Hetta er ikki lætt hjá mongum, tí kanska ætla fleiri sær at nýta sítt otium í Føroyum, men hava tá ikki somu rættindi sum aðrir føroyingar, t.d. valrætt.

Hinvegin skulu danir, sum búgva í Føroyum, eisini velja, og eg veit, at nógvir av hesum ikki vilja missa sín danska statsborgararætt. Hesir vera so fremmandir í einum landi, teir kanska hava búð í í eini 40 ár.

Soleiðis kann ein blíva við at reksa upp fyrimunir við at halda fast um heimastýrislógina. Væl hevur hon eisini síni brek, men hetta kann bøtast um við eini nýggjari heimastýrislóg.

Øll vita. at nógv liggur á láni í Føroyum í løtuni, men tað tykist mær, sum hetta málið um fullveldið hevur so mikið fastatak á tjóðveldismonnum, at teir gloyma alt annað. Høgni Hoydal segði í útvarpinum sunnudagin, at ***tá ið*** fullveldið kemur, so gera vit tað og tað, og ikki, ***um*** fullveldi kemur.

Og um teir skuldu vunnið fólkaatkvøðuna, so verður uppaftur meira at gera við at seta lýðveldi á stovn, at alt annað støðugt kemur at liggja á láni.

Føroya fólk er tó so mikið at sær komið, at tey fella fullveldi á eini fólkaatkvøðu í heyst.

**Petur Hans Dahl**

# Mótmæli

Starvsmannafelagið vil við hesum gera greitt, at vit harðliga mótmæla at ætlanir eru um, at Føroya Løgting skal leggja upp í sáttmálasamráðingarnar hjá Føroya Lærarafelag og soleiðis fáa ein enda á arbeiðssteðginum.

Løgtingið skal halda seg burtur frá sáttmálasamráðingum á arbeiðsmarknaðinum og undir ongum umstøðum leggja upp í hesar trætur. Løgtingið átti heldur at álagt fíggjarmálaráðharranum at fara undir veruligar samráðingar, soleiðis at ein endi fæst á ósemjuni. Hetta er ikki fyrstu ferð, at Fíggjarmálastýrið ikki er sinnað at fara undir veruligar samráðingar, henda trupulleika kenna øll fakfeløg aftur.

Fíggjarmálastýrið heldur óiva at teir spara pening, tí ongar lønir verða útgoldnar, men veruleikin er, at áhaldandi stríðið á arbeiðsmarknaðinum kostar samfelagnum milliónir av krónum.

**Starvsmannafelagið**

**www.sosialurin.fo**